Pauli Einarson, formaður í Føroya Oljuídnað:

Vit hava brúk fyri oljufeløgunum og tey fyri okkum

Paulí Einarsson hittir ein av ovastu stjórunum hjá Phillips, Knud Åm

-Samskipan og samanhald eiga at vera tvey av lyklaorðunum í komandi føroyska oljupolitikkinum heldur formaðurin í Føroya Oljuídnað, sum hevur fingið fleiri oljufeløg at koma til Føroya og kunna seg við viðurskiftini her.

JAN MÜLLER

Nú eitt oljufelag fyri og annað eftir vitjar her á landi eru tað helst mong, sum seta sær spurningin um tað er fyri at gagna okkum ella teimum sjálvum ella báðum tveimum, at tey koma henda vegin, langt áðrenn at nøkur verulig oljuleiting er byrjað.

Vit hava reist henda spurning yvirfyri formanninum í Føroya Oljuídnað sum sjálvur hevur verið við til at knýta bond millum Føroyar og oljuídnaðin.

Pauli Einarson heldur at tað sjálvandi altíð er rætt at vera kritiskur og alla tíðina vága tingini upp móti hvørjum øðrum, eitt nú hvat tænir samfelagnum og ikki. Men hann heldur tað vera sum at síggja trøll á ljósum degi, um so er, at føroyingar síggja tey oljufeløgini sum ynskja at vitja oyggjarnar og kunna seg um viðurskiftini her, sum fíggindar ella nøkur, ið bara hugsa um seg og sítt.

Eg havi onganti𝑑 hoyrt, áðrenn kreppan kom ella áðrenn nakar fór at tosa um oljuvinnu, at handilsferðandi, vinnulívsfólk o.o. komu higar fyri at stinga okkum í bakið. Eins og oljufeløgini komu tey eisini fyri at vísa fram vørur, tænastur o.l.

Kunna seg við okkara viðurskifti

Hvat viðvíkur seinastu vitjanini hjá norska oljufelagnum Saga, so heldur Pauli Einarson, at endamál teirra var ikki at siga frá, hvussu dugnaligir og fantastiskir teir eru. Tað var meira fyri at vita, hvussu dugnaligir føroyingar eru og í hvønn mun føroyingar eru førir fyri at taka ímóti eini oljuvinnu og harvið fáa sum mest burtur úr henni.

So slík vitjan er avgjørt meira enn ein stjørnuoffensivur, soleiðis sum ein av fjølmiðlunum legði upp til nú um dagarnar.

Pauli Einarson er av teirri fatan, at slík vitjan kann gagna okkum, um tað er hetta vit vilja. M.a. vístu Sagafólkini á, hvat, ið virkar væl og minni væl her hjá okkum.

Har teir hava verið og vitjað hevur hetta so eisini sett nakað í gongd í huganum hjá lokalfólki, har hvør á sínum øki tessvegna kann vera við til at byggja upp eina tænastuvinnu.

Pauli Einarson sigur, at tað eru nógv sløg av tænastum í Føroyum, men spurningurin er, um allir sleppa framat orsakað av rutunetinum, sum ikki altíð virkar, ið tað skal.

Fyri at kunna nokta tørvin hjá eini komandi oljuvinnu er gott samband millum oyggjarnar av alstórum týdningi, og somuleiðis sambandið millum Føroyar og uttanheimin.

Pauli Einarson sigur, at Saga-fólkini vóru væl nøgd við vælútbúna infrastrukturin í landinum.

Vit spurdu Paula Einarson í hvønn mun tað er okkara egna ynski at fáa útlendsk oljufeløg henda vegin longu nú.

Tosaðu saman á oljumessu

-Tá vit vóru á vitjan hjá Saga í sambandi við altjóða oljumessuna í Stavanger herfyri bóðu teir okkum koma við einum uppskoti um, hvussu t.d. ein vitjan við teirra fólki kundi gagna føroyska samfelagnum.

Eg segði teimum tá, at tað besta fyri allar partar vildi verið, um teir komu til Føroya og vitjaðu kring landið, tosaðu við fólkið og sóu, hvat er her.

Og so varð. Pauli Einarson legði saman við Saga lagt til rættis eina rættiliga fjølbroytta og umfevnandi vitjan kring landið alt, har høvi var at vitja vinnufyritøkur, kommunur, skúlar, flogvøll, havnir o.s.fr.

Sjálvur heldur Pauli, at tað er av stórum týdningi fyri okkum at kunna vísa oljufólkunum, hvat vit hava at bjóða uppá, hvat vit halda og annars at fáa at vita frá teimum, hvussu teir halda vit á besta hátt gera okkum út til at kunna taka ímóti hesi nýggju vinnu.

Undirvísingarmøguleikar

Sjálvur leggur Pauli Einarson stóran dent á undirvísingarpartin og varð tí eisini vitjað bæði á tekniska skúla í Klaksvík og í Havn og á Fróðskaparsetrinum. Í hesum sambandi vísir Pauli Einarson á, at Saga t.d. hevur møguleika at vera við sum sponsorur, tá talan er um at keypa inn nýggja útgerð, at geva lærarum møguleika at fara út í onnur lond og síggja, hvat oljuvinnan snýr seg um, soleiðis at teir kunnu fara víðari við hesum til næmingarnar o.s.fr.

Okkara tanki við hesi vitjan var mest at vísa, hvat vit eru førir fyri. Sagafólkini vóru tí eisini nógv ríkari, tá tey fóru avstað aftur. Eitt nú hevði teirðin sannført tey um, at infrastrukturin í Føroyum er nógv betri enn tey høvdu roknað við.

Byggja brúgv

Formaðurin í Føroya Oljuídnað sigur seg sjálvan vera stak væl nøgdan við vitjanina hjá SAGA og sigur, at ein av hansara uppgávum er at byggja brúgv millum føroyska samfelagið og oljuvinnuna í øðrum londum og skuldi tað verið okkurt annað oljufelag, sum hevur ynski um at koma á eina líknandi vitjan sum Saga, so verða tey eisini væl móttikin.

Nógv av oljufeløgunum halda kanska, at tey vita nógv um Føroyar, men tá tey standa her á klettunum, sanna tey, at tey vita alt ov lítið. Tey vita ikki, hvussu tingini hanga saman, men tað hava tey eitt betri innlit í eftir slíka vitjan. Slík vitan um føroysk viðurskifti og um okkara tørv er avgerandi, tá tey skulu til at laga sín íløgupolitikk til eitt heilt nýtt og fremmant samfelag. Sjálvandi skulu vit heldur ikki vera so bláoygd at halda, at oljufeløgini bara hugsa um at gagna okkum. Tey skulu sum aðrar vinnulívsfyritøkur hava nakað burtur úr., men eg haldi tað er so ómetaliga týdningarmikið, at báðir partar kunnu hava álit á hvørjum øðrum. Tí sjálvandi vita ella eiga oljufeløgini eisini at vita, at virðing og álitisvekjandi samstarv er tað, sum tænir bæði teimum og okkum best. Her ræður ikki um at lumpa ella mergsúgva hvør annan. Føroyar eru eitt lítið samfelag, sum er sera viðkvæmt, og tí er tað eftir míni meting sera umráðandi, at útbyggingin av samfelagnum til at møta hesi stóru og nýggju avbjóðing byggir á tørv, tilveru og treytir okkara. Og fyri nettup at kunna lúka upp til hesar fortreytir er tað so týdningarmikið við einum opnum og ærligum dialogi og samstarvi.

Hóast vit enn ikki hava sæð nakað til olju, so heldur formaðurin í Føroya Oljuídnaði tað kortini vera umráðandi longu nú at leggja fyrstu lunnarnar undir hesa vinnu.

Tí tað verður ikki so leingi, at oljufeløgini koma hendavegin at arbeiða. Og tá skuldu tey helst vitað, hvussu vit liva í Føroyum. Vit skulu nevniliga eisini vera her, tá oljufeløgini eru farin avstað aftur.

Pauli Einarson heldur tað vera sera umráðandi, at oljufeløgini ikki bara koma til Føroya og siga, at soleiðis og soleiðis ynskja tey, at viðurskiftini skulu vera.

Umframt at vit skulu siga oljufeløgunum, hvussu vit vilja liva í hesum samfelagnum í framtíðini, so heldur Pauli Einarson, at vit eisini skulu lurta eftir teimum, har brúk er fyri broytingum her hjá okkum til at aga okkum til hesa nýggju vinnu.

Gera íløgur

-Men heldur tú ikki at oljufeløgini fyrst og fremst eru úti eftir at tjena pengar?

Sjálvandi. Tey koma ikki henda vegin, um tey ikki rokna við at skula tjena pengar. Men fyri at tjena pengar, mást tú gera íløgur. Og slíkar íløgur koma so eisini Føroyum til góða. Ein av hesum íløgum, um hitt so er týdningarmikil í hvørj-

Pauli Einarson er eitt av mongu uttanlandsferðum sínum har hann royndi at fáa oljuídnaðin at stuðla royndunum at menna ein føroyskan oljuídnað. Her er hann saman við formanninum í norska yrkisfelagnum Frank Nielsen

anini av hesi vinnu, er vitjanin hjá Saga í Føroyum.

Pauli Einarson sær fegin, at onnur oljufeløg kunna seg við føroysk viðurskifti, áðrenn tey koma henda vegin at arbeiða. Hann sigur, at tað er umráðandi, at vit føroyingar kenna teirra filosofi eins væl og tey kenna okkara.

Samskipan og samanhald eru lyklaorðini

Men hvat hevur formaðurin í Føroya Oljuídnað so fingið burtur úr vitjanini hjá Saga?

-Tað er ómetaliga týdningarmikið, at vit duga at samarbeiða, bæði í tí smáa og tí stórra. Fáa vit tað at rigga, so ivist eg ikki í, at vit øll í Føroyum skulu fáa nakað burtur úr oljuvinnuni.

Alt snýr seg um samskipan, og henda vitjanin var so ein smakkiroynd uppá eina slíka samskipan (koordinering).

Pauli Einarson sigur sínar royndir frá hesi rundferð kring oyggjarnar við oljufólkunum vera, at tað lokala ikki er so dominerandi sum annars hevur verið vanligt her á landi.

-Øll vilja sjálvandi hava eitt sindur av køkuni, men eingin segði, at „tað eru bara vit, sum duga". Men heldur eingin dugdi at siga, hvussu vit skulu samarbeiða.

-Nú tú tú arbeiðir so nógv við øllum hesum, hvat heldur tú so vera av størsta týdningi fyri okkum føroyingar í verandi støðu?

Samanhald. Vit mugu so eisini gera alt fyri at kunna okkum við, hvussu henda vinnan hevur ment seg í øðrum londum, og her kundi m.a. verið áhugavert at fingið at vitað, hvussu oljuvinna og fiskivinna í Noregi hava megnað at liva lið um lið. Annað er so tað, at vit umframt at hjúkla um fiskivinnuna, heldur ikki mugu gloyma okkara gomlu traditiónir, fáa vit eina stóra oljuvinnu. Tá má ikki blíva so, at oljan fer við so nógvari tíð, at t.d. eingin tímir í grind longur.

Pauli Einarson er ikki bangin fyri at viðurkenna at vit ikki bara kunnu vænta